LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

ÁRSFRÁGREIÐING UM EFTIRKANNING

LØGTINGSÁRIÐ 2018

29. juli 2018 – 28. juli 2019

LÓGARTÆNASTAN

Við gildi frá løgtingsárinum 2014 skulu øll uppskot frá landsfyrisitingini eftirkannast, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd. Eftirkanningin fer fram eftir ásetingunum í rundskrivi um eftirkanning og rundskrivi um lógarsmíð.

Tað er lógartænastan á Løgmansskrivstovuni sum hevur ábyrgdina av eftirkanningunum. Á lógartænastuni eru fimm starvsfólk, av hesum eru tríggir løgfrøðingar. Arbeiðið er skipað soleiðis, at øll eru við í eftirkanningararbeiðnum. Løgfrøðingarnir hava ábyrgd av tí løgfrøðiligu eftirkanningini, meðan hini bæði starvsfólkini hava ábyrgd av tøkniligu eftirkanningini.

Rundskriv um eftirkanning ásetir, at løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógartilmæli, uppskot til samtyktar, rundskriv og leiðbeiningar skulu eftirkannast. Lógartænastan skal eisini eftirkanna uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Tað er ásett í rundskrivinum, hvat eftirkanningin fevnir um, mannagongdir og tíðarfreistir í samband við innlating av uppskotum og eisini, hvat lógartænastan ikki eftirkannar.

Lógartænastan eftirkannar uppskot tøkniliga og løgfrøðiliga, men ikki málfrøðiliga. Umsitingin í Løgtinginum eftirkannar uppskot eisini málfrøðiliga. Tað er tí ábyrgdin hjá tí einstaka stjórnarráðum at ansa eftir, at uppskot til lógir og kunngerðir eru málsliga lítaleys.

Lógartænastan skal hava minst 5 yrkadagar at eftirkanna eitt uppskot. Hetta eiga stjórnarráðini at hava í huga, tá tey gera tíðarætlan fyri síni uppskot. Í hesum sambandi fara vit á minna á, at uppskotini skulu sendast til eftirkanningar, áðrenn tey verða send til politiskan landsstýrisfund, men aftan á at tey hava verið til ummælis.

Í løgtingsárinum 2018 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 266 uppskot. Lógartænastan eftirkannaði 89% av uppskotunum innan 5 dagar, og 96% av uppskotunum vóru eftirkannaði innan 8 dagar.

Hetta er fimta ársfrágreiðingin, sum verður givin út. Endamálið við útgávuni er framvegis at kunna stjórnarráðini um ymiskt viðvíkjandi lógarsmíði og at siga frá okkara royndum seinasta løgtingárið, og hvussu hetta eftirkanningarárið eftir okkara tykki hevur hepnast.

Eisini er ein partur um ummælistíðir hjá stjórnarráðunum, viðgerðina í Løgtinginum og yvirlit yvir rættarreglur, sum eru kunngjørdar í Kunngerðarblaðnum.

Løgmansskrivstovan, 13. mars 2020

Nella Festirstein
Deildarstjóri

INNIHALDSYVIRLIT

1. Løgfrøðiliga eftirkanningin 5
1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina 5
1.2. At umseta útlendskar lógir til føroyskt 6
1.3. At blanda lógir úr ymiskum londum 6
1.4. Rammulóg 7
1.5. Tvingsilsinntriv 7
1.6. Útsett gildiskoma 8
1.7. Vanligar málsviðgerðarreglur, innlitsreglur og reglur um persóndáta 8
1.8. Samanlegging av myndugleikum 8
1.9. Verklagslógir 8
1.10. Uppskot til samtyktar: Orðing av samtyktini 9
1.11. Upplýsingar- og fráboðanarskylda 9
1.12. At senda til ummælis 9
1.13 Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu 10
2. Tøkniliga eftirkanningin 11
2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina 11
2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti 11
2.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur 12
2.4. Skabelónir 12
3. Yvirlit yvir eftirkanningar 13
3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni 13
3.2. Yvirlit yvir uppskotini 13
3.3. Hvat siga tølini? 17
3.4. Longd á eftirkanning 19
3.5. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum 21
3.5.1. Løgmansskrivstovan 21
3.5.2. Fíggjarmálaráðið 21
3.5.3. Uttanríkis- og vinnumálaráðið 22
3.5.4. Fiskimálaráðið 22
3.5.5. Mentamálaráðið 22
3.5.6. Almannamálaráðið 22
3.5.7. Heilsu- og innlendismálaráðið 22
3.5.8. Samferðslumálaráðið 22

4. Ummælisportalurin 23
4.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin 23
4.2. Ummælisfreistir 24
4.2.1. Ummælisfreistir hjá Fíggjarmálaráðnum 25
4.2.2. Ummælisfreistir hjá Almannamálaráðnum 25
4.2.3. Ummælisfreistir hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum 26
4.2.4. Ummælisfreistir hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum 26
4.2.6. Ummælisfreistir hjá Fiskimálaráðnum 26
4.2.7. Ummælisfreistir hjá Mentamálaráðnum 27
4.2.8. Ummælisfreistir hjá Løgmansskrivstovuni 27
4.3. Samanumtøka um ummælisfreistir 28
4.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin 29
4.4.1. Fíggjarmálaráðið 30
4.4.2. Uttanríkis- og vinnumálaráðið 30
4.4.3. Fiskimálaráðið 31
4.4.4. Mentamálaráðið 31
4.4.5. Almannamálaráðið 32
4.4.6. Heilsu- og innlendismálaráðið 32
4.4.7. Samferðslumálaráðið 32
4.4.8. Løgmansskrivstovan 33
4.5. Samanumtøka um ummælisportalin 33
5. Kunngerðarblaðið 33
5.1. Kunngering í tingárinum 2018 34
5.2. Kunngjørdar rættarreglur hjá stjórnarráðunum 35
5.2.1. Fiskimálaráðið 35
5.2.2. Uttanríkis- og vinnumálaráðið 35
5.2.3. Fíggjarmálaráðið 36
5.2.4. Heilsu- og innlendismálaráðið 36
5.2.5. Mentamálaráðið 36
5.2.6. Løgmansskrivstovan 37
5.2.7. Almannamálaráðið 37
5.2.8. Samferðslumálaráðið 37
6. Samlað yvirlit hjá samgonguni 2015-2019 38
6.1. Eftirkanningar 2015-2018 39
6.2. Kunngjørdar rættarreglur 2015-2018 39

1. Løgfrøðiliga eftirkanningin

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

3.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Eftirkannað uppskot, ið eru fallin fyri freist Løgtingsins og verða løgd fram aftur, skulu eftirkannast aftur, um tey verða løgd fyri Løgtingið aftur. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.

3.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini øll uppskot til kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna. Lógartænastan skal eisini eftirkanna uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Vit fara at taka fram nøkur av teimum evnum, ið vit hava sæð í eftirkanningini í hesum tingárinum.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini í stóran mun taka undir við viðmerkingunum, sum tey fáa til eftirkanningina. Um ráðið heldur, at okkurt er ógreitt, ella tey ikki eru samd við metingina hjá lógartænastuni, so samskifta vit við ráðið um hetta, og sum oftast koma vit til eina felags fatan.

Í hesi ársfrágreiðingini fara vit at taka einstøk evni upp, sum tað hevur verið spurt um, ella sum vit framhaldandi halda eiga at gerast betur.

1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina

7.2. <u>Løgtingslógir:</u> Lógartænastan eftirkannar fyrst og fremst, um løgtingslógaruppskot er í samsvari við grundlóg, heimastýrislóg, stýrisskipanarlóg, tingskipan, tvørgangandi lógir, eitt nú evropeiska mannarættindasáttmálan EMRS, revsilóg, fyrisitingarlóg, løgtingslóg um alment innlit og løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, almennar rættargrundreglur og almenn rættarprinsipp.

7.3. Harumframt verður serliga hugt at heimildarásetingum til fyrisitingina, afturvirkandi virknað, pantireglum, fyrisitingarligum sektaruppskotum, heimild at áseta gjald,

eftirlitsásetingum, afturtøka av løggilding, revsireglum, gildiskomureglum, skiftisreglum, kærureglum o.tíl.

7.4. Lógartænastan eftirkannar, at løgtingslógaruppskotið er greitt og skilligt fyri bæði løgtingsmenn og borgaran, at sundurbýti í lógargreinar, stykkir, kapitlar, yvirskriftir o.tíl. er hóskandi, og at bæði tær almennu og serligu viðmerkingarnar til uppskotið samsvara við sjálvan lógartekstin.

7.6. Kunngerðir: Formligu krøvini til kunngerðir eru sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Lógartænastan kannar fyrst og fremst, um neyðug heimild má metast at vera fyri kunngerðini. Hvat viðvíkur innihaldinum í eftirkanningini annars verður víst til brotini um eftirkanning av løgtingslógaruppskotum.

1.2. At umseta útlendskar lógir til føroyskt

Vit hava í hesum tingárinum sæð, at stjórnarráð - fyri at fáa nýggja og nútímans lóggávu á økinum – í stóran mun umsetti eina útlendska lóg til føroyskt. Hetta hevur givið høvi til at umhugsa, hvussu vit lóggeva í Føroyum. Stjórnarráðini eru smá, og tað er freistandi at finna líknandi lóggávu í einum grannalandi og so umseta hesa til føroyskt. Avbjóðingin er, at skipanir, sum gjøgnum fleiri ár eru mentar í einum øðrum landi og virka væl har, ofta ikki kunnu flytast beinleiðis yvir á føroysk viðurskifti, um vit ikki hava havt eina líknandi menning á fakøkinum her í Føroyum.

Í lógartekstinum vóru harafturat nógvar frágreiðingar, leiðbeiningar, málsviðgerðarreglar o.tíl., sum vit vanliga ikki skrivað í sjálvan lógartekstin men í viðmerkingarnar til lógina. Við hesum breyt lógaruppskotið tískil nógv frá vanligum føroyskum lóggávusiði.

Grannalond okkara eru í vídd nógv størri enn Føroyar, hava eisini nógv fleiri íbúgvar og eisini størri fyrisitingar. Ein lóggáva í Føroyum má altíð taka støði í viðurskiftunum í Føroyum og má lagast til okkara fyrisiting. Betur er at byrja í smáum, fáa tað at virka, og so leggja afturat so við og við, heldur enn at seta eitt víðfevnt lógarverk í gildi, sum okkara fyrisiting, borgarar o.o. ikki er til reiðar at umsita.

1.3. At blanda lógir úr ymiskum londum

Ein onnur avbjóðing er, tá tað í einum lógaruppskotið, sum er grundað á útlendska lóggávu, eru partar úr lóggávu í ymiskum londum t.d. partar úr danskari, norskari ella íslendskari lóggávu. Avbjóðingin er, at siðvenjan – bæði viðvíkjandi lóggávusmíði og fyrisitingarliga – í teimum ymiskum londum kann vera ymisk, og at tað tí kann vísa seg at verða trupult at fáa ein samansetta lóg at virka í verki í Føroyum. Hetta eiga stjórnarráðini serliga at leggja sær í geyma, um tey gera lógaruppskot, sum eru grundað á lóggávu í ymiskum londum.

1.4. Rammulóg

Í hesum tingárinum hava vit eisini sæð lógaruppskot, ið var ein heimildarlóg við sera víðum kørmum. Sum meginregla avger Løgtingið sjálvt, hvussu stórt vald tingið vil geva landsstýrismanni at útfylla karmarnar í lógini, men spurningur er, hvussu víðar heimildir Løgtingið kann geva landsstýrismanninum, uttan at hetta er í stríð við § 1 í stýrisskipanarlógini, sum m.a. ásetir at lóggávuvaldið hjá løgtinginum og løgmanni í felag, og at útinnandi valdið er hjá landsstýrinum.

Í hesum førinum var myndugleikabygnaðurin sambært lógini ikki lógarfestur, men hetta varð latið upp í hendurnar hjá landsstýrismanninum at avgera.

Sambært lógaruppskotinum var landsstýrismaðurin ovasti myndugleiki, eftirlitsmyndugleiki, skuldi geva loyvir og strika og broyta treytir í loyvum. Orsakað av tí manglandi myndugleikabygnaðinum í lógaruppskotinum, vóru heldur ongar kærureglur ásettar í lógini, tí allar heimildir lógu hjá landsstýrismanninum. Hetta er sera óheppið, serstakliga tá ið lógin gav ógvuliga víðar heimildir, umframt at lógin heimilaði sera nógv og tyngjandi tvingsilsinntriv.

Hetta hevði eisini við sær, at tað ikki var møgulig hjá stjórnarráðnum at greiða frá, hvørjar fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar uppskotið fór at hava við sær. Tað er ikki nøktandi, at tað í einum lógaruppskoti, sum gevur so nógvar og víðar heimildir til landsstýrismannin, ikki kann verða greitt frá, hvørjar fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar uppskotið hevur við sær. Tá er sannlíkt at lógaruppskotið ikki er búgvið til at leggja fyri Løgtingið, og at stjórnarráðið eigur at brúka meira tíð at fyrireika uppskotið.

Talan var eisini um eina tvørgangandi løgtingslóg, sum kom inn á málsøkið hjá øðrum landsstýrismonnum. Tað hevur eisini serligar avbjóðingar við sær, ið krevur samskipan millum fleiri stjórnarráð í umsitingini av lógini. Uppskotið fevndi eisini um málsøki, sum liggja hjá kommunum, so talan var um eitt torgreitt øki at lóggeva fyri og við nógvum áhugapørtum og áhugamálum.

Vit mæla til at um eitt stjórnarráð ger rammulóg – heimildarlóg – so eigur sum minstamark skipanin, ábyrgdarøki, myndugleikabygnaðurin, kærugongdin og onnur yvirskipaði mál at vera ásett í lógini. Løgtingið má vita, hvat tað er fyri ein skipan, sum ætlanin er at seta í verk, og at landsstýrismaðurin ikki fær so víðar heimildir, at hann kann gera eina heilt øðrvísi skipan seinni.

1.5. Tvingsilsinntriv

Í einum uppskoti vóru ásetingar um nógv og ógvuliga tyngjandi tvingsilsinntriv, samstundis sum ásetingarnar í lógini, sum skulu vera grundarlagið fyri tvingsilsinntrivini, vóru sera óítøkiligar. Hetta er ógvuliga óheppið og spurningurin er, um inntrivini standa mát við lógarbrotið.

Ásetingar vóru um: rætting og bøtandi tiltøk, tinglýsing, beinleiðis fremjing, brúk av ogn hjá øðrum, fyrisitingarlig haldlegging, fyrisitingarligur inndráttur, tvingsilsbøtur og náttúruendurgjald. Bara tað at umsita allar hesar heimildir krevur ein væl størri umsitingarmyndugleika, sum hevur nøktandi serkunnleika, enn teir stovnar, sum vit hava í Føroyum.

Tað er týdningarmikið, at tá ið heimild til tvingsilsinntriv verður sett inn í lógina, at einans tað verður tikið við í uppskotið, sum verður mett neyðugt í mun til føroysk viðurskifti. Eisini eigur at

vera umhugsa, um umsitingin innan fakøki hevur ta neyðugu vitan og royndirnar brúka og handhevja slíkar heimildir.

1.6. Útsett gildiskoma

Í fleiri førum er komið fyri, at skotið verður upp at hava útsetta gildiskomu. Tvs. at landsstýrismaðurin skal hava heimild at seta lógina í gildi við kunngerð.

Meginreglan er, at øll løgtingslógin verður sett í gildi í einum. Heimild til at seta løgtingslóg í gildi við kunngerð kann bara brúkast eina ferð.

Vit skulu vísa á, at útsett gildiskoma bara kann vera brúkt í undantaksføri, og tað eigur í viðmerkingunum at verða greitt væl frá, hví neyðugt er at útseta gildiskomuna.

1.7. Vanligar málsviðgerðarreglur, innlitsreglur og reglur um persóndáta

Tað kemur javnan fyri, at tað í lógaruppskoti verða ásettar serligir málsviðgerðarreglur ella skotið verður upp at skerja innlitsreglurnar sbrt. innlitslógini. Lógartænastan ger vart við, at reglurnar sambært fyrisitingarlóg, innlitslóg og persónupplýsingarlóg eiga at vera nøktandi í nærum øllum førum. Um tað í einstøkum føri ikki er so, má stjórnarráðið grundgeva fyri, hví er neyðugt at víkja frá vanligu reglunum og vísa á, hví vanligu reglurnar ikki eru nøktandi.

1.8. Samanlegging av myndugleikum

Tá arbeiðsuppgávurnar hjá tveimum ymiskum myndugleikum verða lagdar til annan av myndugleikunum, má hædd takast fyri hvussu kærugongdin framyvir skal vera. Tað kann vera at myndugleikarnar hava havt hvør sín kærumyndugleika. Vanliga vil kærugongdin frameftir fylgja kærugongdini hjá tí myndugleikanum, sum fær eina nýggja uppgávu. Men tað kunnu vera viðurskifti t.d. serkunnleiki, sum ger, at kærugongdin ikki kann vera tann sama, hóast sami myndugleiki hevur báðar arbeiðsuppgávurnar.

Tað má takast støða til um kærast skal til landsstýrismannin, møguliga at landsstýrismaðurin fær heimild til at leggja kærumyndugleikan til ein kærunevnd, ella at tað beinleiðis verður ásett í lógini, at tað skal kærast til eina kærunevnd.

1.9. Verklagslógir

Fyri størri løguverkætlanir uppá 10 mió. kr. ella meira skal verða gjørd ein verklagslóg. Hetta verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.

Verklagslógin skal hava eina áseting um samlaðu løguupphæddina og hava eina sólseturáseting, ið ásetur, nær løgtingslógin fer úr gildi. Sólseturáseting skal verða grundað á eina veruliga meting av, hvussu leingi byggiætlanin væntandi fer at vara, umframt at lagt eigur at verða upp fyri møguligum seinkingum.

Í viðmerkingunum til løgtingslógina eigur at verða greitt væl frá verklagnum Tað skal verða grundgivið fyri, hvussu komið er fram til setta áramálið, og tað eigur at verða greitt frá, hvussu komið er fram til samlaðu løguupphæddina í løgtingslógini.

Í eftirkanningini av verklagslógum í hesum tingárinum hava verið fleiri verklagslógir, har lógartænastan hevur mælt til at greiða betri frá, hvussu kostnaðurin var útroknaður, og hvussu komið var fram til áramálið í tíðarætlanini. T.d. at tað verður upplýst, hvat er við í kostnaðinum: grundstykki, projektering, bygging, innbúgv?

Tað hevur í fleiri førum verið soleiðis, at tað hevur verið trupult hjá stjórnarráðunum at greiða frá áramáli og útrokningum í verkætlanini. Hetta kann vera ein ábending um, at verkætlanin ikki er komin nóg langt í tilgongdini, og at lógaruppskotið tí ikki er búgvi at leggja fyri tingið.

Eisini hevur tað í tingárinum verið gjørt vart við, at verklagslógir ikki eiga at verða broyttar ov ofta.

Verður verklagið broytt munandi eigur at verða umhugsað, um nýggj verklagslóg eigur at verða gjørd.

Uppskot til verklagslógir eiga altíð at verða sendar til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum. Hetta skal verða gjørt, áðrenn uppskotið verður sent til eftirkanning.

1.10. Uppskot til samtyktar: Orðing av samtyktini

Løgtingið tekur bara støðu til ítøkiligar gerðir. Tað merkir, at Løgtingið tekur bara støðu til, um t.d. ein millumtjóða sáttmáli skal sigast upp ella ei. Løgtingið tekur ikki støðu til eina møguliga uppsøgn av sáttmálanum. Um landsstýrið ynskir at lodda dýpið politiskt, eigur landsstýrismaðurin at biðja um fund við uttanlandsnevndina í Løgtinginum.

Møgulig afturtøka av eini uppsøgn verður gjørd á sama hátt, sum tá ið landsstýrið fekk heimild til at siga upp. Tað vil siga við at leggja uppskot til samtyktar fyri Løgtingið um at taka uppsøgnina aftur.

1.11. Upplýsingar- og fráboðanarskylda

Tað ber ikki til at áleggja upplýsingar- og fráboðanarskylda, sum stríðir ímóti ásetingini um tagnarskyldu í § 152 í revsilógini. Harafturat má atlit takast til møguleikanum fyri sjálvsinkriminering, sum kann stríða ímóti ásetingunum í rættargangslógini og í EMRS.

1.12. At senda til ummælis

Í fleiri lógaruppskotum var sagt, at uppskotið fór at verða sent til ummælis, tá uppskotið var framlagt í Løgtinginum. Lógartænastan viðmerkti í eftirkanningini, at hetta ikki var góður lóggávusiður og var ein samanblanding av útinnandi og lóggevandi valdinum. Landsstýrið eigur at viðgera uppskotið liðugt, áðrenn uppskotið verður borið í Løgtingið. Tá uppskotið er framlagt í Løgtinginum, er tað farið úr hondum landsstýrisins, og tá eru tað tingnevndirnar og Løgtingið, sum viðgera uppskotið. Eitt lógaruppskot har avvarandi partar ikki vóru hoyrdir, helt lógartænastan ikki var búgvið at leggja fyri Løgtingið.

Tað hevur eisini verið spurgt, um tað er neyðugt at senda uppskot til ummælis, tá ongin ivi er um, at broytingin skal fremjast. Lógartænanstan vísti á, at tað er ongantíð verri fyri eitt uppskot, at tað verður sent til ummælis, hóast ongin ivi er um, at broytingin skal fremjast. Tað kann vera við til at upplýsa lógaruppskotið betri og eisini avleiðingarnar av tí.

1.13 Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> *7.7. Ríkislógartilmæli: Formligu krøvini til ríkislógartilmæli eru sambært § 45 í tingskipanini tey somu sum til løgtingslógaruppskot sambært § 37, og sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Eftirkanningin fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um løgtingslógaruppskot, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama. Hetta er grundað á, at ríkislógartilmæli grundleggjandi víkja frá løgtingslógaruppskotum, tí talan er um lógartekst, sum longu er galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.*
>
> *7.8. Bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse: Sambært stýrisskipanarlógini § 48 er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum ummælir uppskot til kunngerðir, sum ráðharri sendir landsstýrinum við atliti at seta í gildi fyri Føroyar. Eftirkanningin av hesum fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um uppskot til kunngerðir, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama, tí talan er ofta um kunngerðir, sum longu eru galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.*
>
> *7.9. Við eftirkanningini sambært nr. 7.7. og 7.8. verður serliga hugt eftir, um tað í inngangínum verður víst til lóg ella kunngerð, sum er sett í gildi fyri Føroyar, og hvørjar tillagingar eru gjørdar til føroysk viðurskifti.*

Ríkislóggáva er t.d. serstakar fólkatingslógir fyri Føroyar og kongligar fyriskipanir umframt danskar kunngerðir. Hesi uppskot skulu eisini sendast lógartænastuni til eftirkanningar.

Donsk lógaruppskot og fyriskipanaruppskot senda stjórnarráðini sum oftast til eftirkanningar, tá uppskotið er klárt at senda til landsstýrisfund, soleiðis sum ásett er í rundskrivinum um eftirkanning.

Tá talan er um størri lógaruppskot mælir lógartænastan til, at danska lógaruppskotið ella fyriskipanaruppskotið verður sent lógartænastuni til undaneftirkanning, áðrenn tað verður sent til ummælis. Hetta soleiðis at møguligar tøkniligar villur og tilvísingar til føroyska lóggávu kunnu verða rættaðar av ríkismyndugleikunum, áðrenn uppskotið verður sent út til ummælis.

Danskar kunngerðir (bekendtgørelser) skulu eisini sendast til eftirkanning. Hetta tykjast øll stjórnarráðini ikki at geva sær nóg nógv fær um, tí tað kemur meira enn so fyri, at lógartænastan fyrstu ferð sær danskar kunngerðir, tá tær verða sendar til kunngering í Kunngerðarblaðnum.

Vit fara at heita á stjórnarráðini um at minnast til at senda bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelser til eftirkanning, tá tey fáa uppskotini til ummælis frá ríkismyndugleikunum.

2. Tøkniliga eftirkanningin

2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> *6.1. Tøkniliga eftirkanningin verður gjørd eftir ásetingunum í rundskrivi um lógarsmíð og skal tryggja, at uppskotið uttan trupulleikar ella ivamál kann kunngerast í Kunngerðablaðnum og samanskrivast í logir.fo.*
>
> *6.2. Er avvarðandi stjórnarráð og lógartænastan ikki á einum máli um onkra viðmerking, skal stjórnarráðið venda sær til lógartænastuna hesum viðvíkjandi.*
>
> *6.3. Uppskot til rundskriv og leiðbeiningar verða einans tøkniliga eftirkannað. Tó so, um okkurt eyðsýnt ivamál er, so verður hetta nevnt.*

Lógartænastan eftirkannar uppskot í mun til galdandi rundskriv um lógarsmíð, sum kom í gildi 1. januar 2018

Viðvíkjandi tí tøkniliga partinum av eftirkanningini er tað framvegis soleiðis, at onkur av stjórnarráðunum ikki geva sær nóg nógv far um, at tað er tað eftirkannaða uppskotið (skjalið), sum skal sendast til Løgtingið ella til kunngering.

2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti

Tað kemur eisini fyri, at stjórnarráðini broyta uppskotið, eftir at tað hevur verið til eftirkanningar, t.d. strika ella seta nýggjar ásetingar inn. Tá hava vit eisini seinni sæð, at broytingin ikki er sett rætt upp tøkniliga. Vit mæla til, at um broytingar verða gjørdar í uppskotinum aftan á eftirkanningina, at stjórnarráðini senda uppskotið til nýggja endureftirkanning. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

2.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur

Uppskot, sum er burturfallið í Løgtinginum, t.d. tí tingsetan endaði, áðrenn uppskotið var liðugt viðgjørt, og sum landsstýrið aftur ætlar at leggja fyri Løgtingið, skal sendast til eftirkanning eins og onnur uppskot, hóast uppskotið hevur verið eftirkannað í eini fyrru tingsetu. Tað vísir seg oftani, at smærri broytingar eru gjørdar, og at tøkniligar villur sníkja seg inn aftur í uppskotið. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

2.4. Skabelónir

Lógartænastan hevur gjørt 8 skabelónir til: løgtingslóg, løgtingslóg um broyting í løgtingslóg, javntekst, kunngerð, kunngerð um broyting í kunngerð, ríkislógartilmæli, rundskriv og leiðbeiningar.

Nýggjasta útgávan er altíð at finna á breddanum hjá lógartænastuni á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni: http://www.lms.fo/fo/arbeidsoki/logarsmid/word-skabelonir-til-logarsmid/

Øll sum gera uppskot til løgtingslógir, kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar o.a. eiga at brúka skabelónirnar, tí hetta ger, at uppskotini verða tøkniliga rætt sett upp.

3. Yvirlit yvir eftirkanningar

3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> *3.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll uppskot til løgtingslóg, ríkislógartilmæli og samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Eftirkannað uppskot, ið eru fallin fyri freist Løgtingsins og verða løgd fram aftur, skulu eftirkannast aftur, um tey verða løgd fyri Løgtingið aftur. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.*
>
> *3.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini øll uppskot til kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna. Lógartænastan skal eisini eftirkanna uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.*

Í løgtingsárinum 2018 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 266 uppskot frá øllum átta stjórnarráðunum. Hetta er 18 uppskot fleiri enn í 2017, og hetta er hægsta talið av eftirkannaðum uppskotum síðani tingárið 2014. Hækkingin er javnt býtt millum øll stjórnarráðini.

Nøgdin av uppskotum sigur tó ikki alt, tí uppskotini kunnu vera sera ymisk bæði í longd, torleika og margfeldið. Soleiðis var eisini í hesum tingárinum.

3.2. Yvirlit yvir uppskotini

Niðanfyri er yvirlit yvir uppskotini frá teimum ymisku stjórnarráðunum. Tølini eru fyri løgtingsárini 2014, 2015, 2016, 2017 og 2018.

Talva 1	**Løgmansskrivstovan**				
	2014*	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**
Løgtingslóg	**-**	**-**	**1**	**-**	**-**
Kunngerð	**-**	**3**	**12**	**-**	**2**
Broytingarlóg	**2**	**-**	**4**	**1**	**5**
Broytingarkunngerð	**-**	**-**	**3**	**-**	**-**
Ríkislógartilmæli	**-**	**1**	**3**	**-**	**1**
Uppskot til samtyktar	**3**	**-**	**-**	**-**	**-**
Rundskriv				**-**	**1**
Fráboðan frá løgmanni	**1**	**2**	**-**	**-**	**1**
Ialt	**6**	**6**	**23**	**1**	**10**

*Uttanríkistænastan partur av LMS

Talva 2	Fíggjarmálaráðið				
	2014	2015	2016	2017	2018
Løgtingslóg	5	3	2	3	4
Kunngerð	8	10	3	7	-
Broytingarlóg	16	24	10	14	21
Broytingarkunngerð	1	1	8	5	2
Ríkislógartilmæli	19	-	3	11	3
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-	-
Rundskriv				6	4
Leiðbeining				1	-
Ialt	49	38	26	47	34

Talva 3	Uttanríkis- og vinnumálaráðið				
	2014*	2015	2016	2017	2018
Løgtingslóg	2	1	4	7	3
Kunngerð	11	9	17	26	12
Broytingarlóg	19	6	7	5	7
Broytingarkunngerð	6	3	6	7	6
Ríkislógartilmæli	6	1	1	-	1
Uppskot til samtyktar	-	1	-	1	2
Rundskriv				-	2
Stovnar				5	1
Ialt	44	21	35	51	34

* Vinnumálaráðið

Talva 4	Fiskimálaráðið				
	2014	2015	2016	2017	2018
Løgtingslóg	4	2	3	4	1
Kunngerð	29	28	29	33	31
Broytingarlóg	6	8	4	3	6
Broytingarkunngerð	14	12	18	21	24
Ríkislógartilmæli	0	0	1	-	-
Uppskot til samtyktar	0	0	0	-	-
Leiðbeining				1	-
Ialt	53	50	55	62	62

Talva 5	Mentamálaráðið				
	2014	2015	2016	2017	2018
Løgtingslóg	6	1	2	1	5
Kunngerð	7	9	4	6	22
Broytingarlóg	10	9	6	7	4
Broytingarkunngerð	3	8	3	6	10
Ríkislógartilmæli	-	--	-	-	-
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-	-
Rundskriv				-	1
Íalt	26	27	15	20	42

Talva 6	Almannamálaráðið				
	2014	2015	2016	2017	2018
Løgtingslóg	-	2	1	5	4
Kunngerð	1	4	14	1	4
Broytingarlóg	15	8	9	9	16
Broytingarkunngerð	2	4	2	1	5
Ríkislógartilmæli	-	-	-	-	-
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-	-
Íalt	18	18	26	16	29

Talva 7	Heilsu- og innlendismálaráðið				
	2014*	2015	2016	2017	2018
Løgtingslóg	2	1	1	2	5
Kunngerð	9	9	10	10	18
Broytingarlóg	7	6	7	5	7
Broytingarkunngerð	9	7	6	18	3
Ríkislógartilmæli	2	1	3	1	1
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-	-
Íalt	29	24	27	36	34

*Heilsumálaráðið

Talva 8	Samferðslumálaráðið				
	2014*	2015	2016	2017	2018
Løgtingslóg	-	1	-	1	5
Kunngerð	-	-	3	5	4
Broytingarlóg	-	3	3	2	6
Broytingarkunngerð	-	1	4	7	4
Ríkislógartilmæli	-	-	-	-	-
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-	-
Ílalt	-	5	10	15	19

*Samferðslalaráðið varð stovnað í 2015

Talva 9	Stovnar undir landsstýrinum*				
	2014	2015	2016	2017	2018
Kunngerð	4	2	5	1	-
Broytingarkunngerð	-	-	-	4	1
Ílalt	4	2	5	5	1

*Sjóvinnustýrið og Fjarskiftiseftirlitið

Talva 10	Eftirkanningar ialt				
	2014	2015	2016	2017	2018
Løgtingslóg	19	11	14	23	29
Kunngerð	69	74	97	88	93
Broytingarlóg	75	64	50	46	72
Broytingarkunngerð	35	36	50	65	54
Ríkislógartilmæli	27	3	11	12	6
Uppskot til samtyktar	3	1	-	1	2
Fráboðan frá løgmanni	1	2	-	-	1
Stovnar				5	1
Rundskriv				6	8
Leiðbeining				2	-
Ílalt	229	191	222	248	266

3.3. Hvat siga tølini?

Mynd 1



Verður hugt eftir býtinum av teimum 266 uppskotunum millum løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógartilmæli og uppskotum til samtyktar í tingárinum 2018 í mun til í 2017, sæst at tað eru nakað fleiri løgtingslógir, broytingarlógir og broytingarkunngerðir útgivnar í tingárinum 2018 í mun til í 2017.

Av teimum 266 uppskotunum vóru 29 nýggjar løgtingslógir í mun til 23 í 2017. Ein nýggj løgtingslóg merkir, at tað verður lóggivið um nakað, sum tað ikki fyrr er lóggivið um, ella at lóggávan á økinum verður endurnýggja og umskipað soleiðis, at tað ikki er nøktandi at gera broytingar í eini galdandi løgtingslóg. Av teimum 29 lógaruppskotunum áttu Mentamálaráðið, Samferðslumálaráðið og Heilsu- og innlendismálaráðið hvør 5, Fíggjarmálaráðið og Almannamálaráðið hvør 4, Uttanríkis- og vinnumálaráðið 3 og Fiskimálaráðið 1 av uppskotunum. Uppskotini eru sostatt býtt javnt millum hini stjórnarráðini, tó so hevði Løgmansskrivstovan onga nýggja løgtingslóg.

Hinvegin vóru 72 uppskot um at gera broytingar í galdandi løgtingslógum. Hetta er ein stór øking í mun til 2017, tá tað vóru 46 uppskot til broytingarlógir. Av hesum átti Fíggjarmálaráðið 21, Almannamálaráðið 16, Heilsu- og innlendismálaráðið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið 7 hvør, Fiskimálaráðið og Samferðslumálaráðið 6 hvør, Løgmansskrivstovan 5 og Mentamálaráðið 4.

Tølini vísa eisini, at Fíggjarmálaráðið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið høvdu væl færri uppskot, meðan Mentamálaráðið og Almannamálaráðið høvdu væl fleiri uppskot í tingárinum 2018 enn í 2017. Verður hugt nærri at hesum tølum sæst, at tað serliga er tal av lógaruppskotum/

ríkislógartilmælum ella tal av kunngerðum, sum er grundin til, at stjórnarráðini antin høvdu fleiri uppskot ella færri uppskot í 2018 enn í 2017.

Av samlaðu eftirkannaðu uppskotunum átti Fiskimálaráðið 62, Mentamálaráðið 42, Fíggjarmálaráðið 34, Uttanríkis- og vinnumálaráðið 34, Heilsu- og innlendismálaráðið 34, Almannamálaráðið 29, Samferðslumálaráðið 19 og Løgmansskrivstovan 10.

Av teimum 266 uppskotum var 1 kunngerð frá stovni, sum hevur lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum. Hetta var ein broytingarkunngerð frá Sjóvinnustýrinum. Tað er bara Fjarskiftiseftirlitið og Sjóvinnustýrið, sum hava lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum.

Mynd 2



Tað sæst týðuliga, at tað serliga eru kunngerðirnar, sum tað eru flest av í eftirkanningini. Av teimum 266 uppskotunum vóru 147 kunngerðir, av hesum 93 nýggjar kunngerðir og 54 broytingarkunngerðir. Tvs. at 55% av eftirkanningunum í tingárinum 2018 vóru kunngerðir.

Hinvegin vóru 101 lógaruppskot, av hesum 29 nýggjar lógir og 72 broytingarlógir; hetta svarar til 38% av eftirkannaðu uppskotunum. Ríkislógartilmælini vóru 6 í tali svarandi til 2%. Seinastu 5% eru uppskot til samtyktar, rundskriv og leiðbeiningar.

3.4. Longd á eftirkanning

Rundskrivið um eftirkanning ásetir:

> *4.2. Lógartænastan skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar til eftirkanning. Í serligum førum, tá arbeiðsbyrðan hjá lógartænastuni kann væntast at vera stór, t.d. undan seinasta framløgudegi, kann roknast við, at eftirkanning tekur longri enn 5 yrkadagar. Hetta eigur landsfyrisitingin at hava í huga.*

Í løgtingsárinum 2018 blivu 89% av uppskotunum eftirkannað innan 5 dagar, ið er minst ásetta tíðin, sum lógartænastan skal hava til at eftirkanna uppskot. Hetta er ein framgongd í mun til løgtingsárið 2017.

Tó vóru 96% av uppskotunum í 2018 eftirkannað innan 8 yrkadagar í mun til 92% í 2017. Hini 4% av uppskotunum vóru eftirkannað millum 9 og 29 dagar. Øll átrokandi uppskot hava verið eftirkannað innan ásettu tíðina, meðan tað hava verið uppskot, sum ikki hava havt skund, sum hava bíðað.

Talva 11	**Longd á eftirkanning**									
	2014		**2015**		**2016**		**2017**		**2018**	
	Nøgd	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**
1-5 dagar	178	77,7	171	89,5	170	76,6	206	83	234	89
6-8 dagar	32	14,0	5	2,6	20	9,0	22	9	20	7
9 dagar ella longri	19	8,3	15	7,9	32	14,4	20	8	11	4
Ialt	**229**	**100,0**	**191**	**100,0**	**222**	**100,0**	**248**	**100**	**265**	**100**

Mynd 3


Longd av eftirkanning 2018
9 dagar ella longri 4%
6-8 dagar 7%
1-5 dagar 89%
1-5 dagar
6-8 dagar
9 dagar ella longri

Mynd 4


Longd á eftirkanning 2014-2018
250
200
150
100
50
0
1-5 dagar
6-8 dagar
9 dagar ella longri
2014
2015
2016
2017
2018

3.5. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum

Tað sæst á tølunum, at tað vóru eftirkannað tilsamans 107 lógaruppskot hjá øllum stjórnarráðunum tilsamans. Av hesum vóru 29 høvuðslógir, 72 broytingarlógir og 6 ríkislógartilmæli.

Landsstýrið legði 89 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti 55 av lógaruppskotunum, meðan heili 34 lógaruppskot fullu burtur, tá tingsetan endaði. Hetta merkir, at einans 62% av uppskotum landsstýrisins vóru samtykt, meðan 38% fullu burtur, tí tey ikki høvdu undirtøku í tinginum. Hetta er sera óvanligt.

Orsøkin til at eitt so stórt tal av lógaruppskotum fall burtur er lutvíst tí, at landsstýrið virkaði sum minnilutasamgonga, og tí var neyðugt hjá landsstýrinum at fáa undirtøka frá tingfólki uttanfyri samgonguna fyri at fáa meiriluta fyri lógaruppskotunum. Serliga hetta seinasta tingárið gjørdist tað trupult.

Eisini sæst at 17 av teimum eftirkannaðu uppskotunum ikki vóru løgd fyri tingið, sannlíkt tí at politisk undirtøku ikki hevur verið fyri uppskotunum í landsstýrinum ella samgonguni.

Mynd 5



3.5.1. Løgmansskrivstovan

Hjá Løgmansskrivstovuni vóru 6 lógaruppskot eftirkannað. Av hesum vóru 5 broytingarlógir og 1 ríkislógartilmæli. Øll 6 uppskotini vóru løgd fyri Løgtingið, sum samtykti 4 av uppskotunum, meðan 2 fullu burtur, tá tingsetan endaði.

3.5.2. Fíggjarmálaráðið

Tað vóru eftirkannað 28 lógaruppskot hjá Fíggjarmálaráðnum. Av hesum vóru 4 høvuðslógir, 21 broytingarlógir og 3 ríkislógartilmæli. Av hesum vóru 24 uppskot løgd fyri Løgtingið, sum samtykti 20 av uppskotunum, meðan 4 fullu burtur, tá tingsetan endaði.

3.5.3. Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tað vóru eftirkannað 11 lógaruppskot hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Av hesum vóru 3 høvuðslógir, 7 broytingarlógir og 1 ríkislógartilmæli. Øll 11 vóru løgd fyri Løgtingið, sum samtykti 10 av uppskotunum, meðan 1 fall burtur, tá tingsetan endaði.

3.5.4. Fiskimálaráðið

Tað vóru eftirkannað 7 lógaruppskot hjá Fiskimálaráðnum. Av hesum var 1 høvuðslóg og 6 broytingarlógir. Øll 7 uppskotini vóru løgd fyri Løgtingið, sum samtykti 4 av uppskotunum, meðan 3 fullu burtur, tá tingsetan endaði.

3.5.5. Mentamálaráðið

Tað vóru eftirkannað 9 lógaruppskot hjá Mentamálaráðnum. Av hesum vóru 5 høvuðslógir og 4 broytingarlógir. Tað vóru løgd 7 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti 4 av uppskotunum, meðan 3 fullu burtur, tá tingsetan endaði.

3.5.6. Almannamálaráðið

Tað vóru eftirkannað 20 lógaruppskot hjá Almannamálaráðnum. Av hesum vóru 4 høvuðslógir og 16 broytingarlógir. Tað vóru løgd 18 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti 7 uppskot, meðan 11 uppskot fullu burtur, tá tingsetan endaði.

3.5.7. Heilsu- og innlendismálaráðið

Tað vóru eftirkannað 13 lógaruppskot hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum. Av hesum vóru 5 høvuðslógir, 7 broytingarlógir og eitt ríkislógartilmæli. Tað vóru løgd 8 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti 3 uppskot, meðan 5 uppskot fullu burtur, tá tingsetan endaði.

3.5.8. Samferðslumálaráðið

Tað vóru eftirkannað 11 lógaruppskot hjá Samferðslumálaráðnum; 5 høvuðslógir og 6 broytingarlógir. Tað vóru løgd 8 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti 3 uppskot, meðan 5 uppskot fullu burtur, tá tingsetan endaði.

Mynd 6



4. Ummælisportalurin

Uppskot eiga altíð at verða send til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, og vanliga eigur tíðarfreistin at lata inn ummæli at vera 4 vikur. Henda freist eigur ikki at verða skerd uttan so, at tað er átrokandi neyðugt.

Eftir áheitan frá MEGD verður mælt til, at stjórnarráðini í størst møguligan mun eisini senda uppskot til ummælis hja MEGD.

Uppskot til verklagslógir eiga altíð at verða sendar til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum.

Umframt at stjórnarráðini senda uppskot til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, skulu øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini leggjast á ummælisportalin, sum er á heimasíðuni hjá landsstýrinum, og sum øll hava atgongd til.

Ummælisportalurin sæst her: http://www.foroyalandsstyri.fo/fo/kunning/uppskot-til-ummaelis/

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini nú eru meira tilvitað um at leggja fyrireikingararbeiðið við lógaruppskotum soleiðis til rættis, at tað í tíðarætlanini eisini verður sett tíð til, at uppskot kunnu verða send til ummælis, sum høvuðsregla í 4 vikur.

Enn er tað tó soleiðis, at orsakað av tíðarneyð verður ummælistíðin ofta skerd, heilt niður í nakrar dagar, og í hesum førunum verða uppskotini ofta heldur ikki løgd á almenna ummælisportalin. Hetta hevur við sær, at dygdin á lógaruppskotinum ikki gerst so góð, sum hon kundi verðið.

4.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin

Grundarlagið fyri hesum partinum av ársfrágreiðingini er ein uppteljing av teimum uppskotum, sum hava verið løgd út alment til ummælis á ummælisportalurin, sum er á heimasíðuni hjá landsstýrinum. Tað merkir, at uppskot, sum als ikki hava verið send til ummælis, ella sum einans hava verið send beinleiðis til ummælis hjá viðkomandi uttanhýsis pørtum, ikki eru við í hesi

uppteljing. Yvirlitið vísir sostatt einans ummælisfreistir fyri tey uppskot, sum hava verið á ummælisportalinum.

Í tingárinum 2018 hevði Samferðslumálaráðið 19 uppskot til løgtingslóg og kunngerð, men einki av hesum uppskotum eru løgd út til almenna hoyring á ummælisportalinum. Nøkur av hesum uppskotunum hava tó verið send beinleiðis til ummælis hjá viðkomandi pørtum.

4.2. Ummælisfreistir

Á ummælisportalinum sæst, at í tingárinum 2018 løgdu stjórnarráðini tilsamans 102 uppskot alment til ummælis á ummælisportalinum. Av hesum vóru 47 løgtingslógaruppskot, 49 kunngerðir, 4 ríkislógartilmæli og 2 uppskot til samtyktar. Stytsta ummælisfreistin var 3 dagar og longsta var 53 dagar.

Talva 12	**Ummælisfreistir**			
	2017		**2018**	
	Nøgd	**%**	**Nøgd**	**%**
1 - 14 dagar	22	29	34	33
15 - 27 dagar	38	49	33	33
28 dagar ella longri	17	22	35	34
Ialt	**77**	**100**	**102**	**100**

Sum høvuðsregla eiga uppskot at verða send til ummælis í 4 vikur ella 28 dagar. Tað sæst á talvuni omanfyri, at fyri 67 ella 66% av uppskotunum var ummælisfreistin í løgtingsárinum 2018 sett millum 1-27 dagar, og fyri 35 ella 34% av uppskotunum var ummælisfreistin 28 dagar ella meira. Tað merkir, at tað er ein góður triðingur av øllum uppskotunum, sum hava havt tilmæltu ummælistíðina upp á 4 vikur. Hetta er ikki nøktandi, men er ein stórur bati í mun til tingárið 2017.

Ein ummælisfreist, sum er minni enn 14 dagar, verður als ikki mett at vera nøktandi. Ein ummælisfreist upp á í minsta lagi 15 dagar má roknast sum eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist. Á talvuni omanfyri sæst at fyri 34 ella 33% av uppskotunum var ummælisfreistin sett millum 1-14 dagar, og fyri 68 ella 67% av uppskotunum var ummælisfreistin meira enn 15 dagar.

Tað merkir, at meira enn ein triðingur av øllum uppskotunum ikki hava havt eina nøktandi ummælisfreist. Tað eru alt ov nógv uppskot eftir okkara tykki.

Mynd 7



Myndin vísir, at einans 34% ella 35 uppskot hava havt tilmæltu ummælistíðini upp á minst 4 vikur. Av hesum eru 21 lógir og 14 kunngerðir. Tað eru 33% ella 34 uppskot, sum ikki hava havt eina ummælistíð upp á í minsta lagi 14 dagar, sum má metast at vera eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist. Her er býti millum lógir og kunngerðir soleiðis, at tað eru 20 lógir, 12 kunngerðir og 2 uppskot til samtyktar.

4.2.1. Ummælisfreistir hjá Fíggjarmálaráðnum

12 lógaruppskot vóru send til ummælis í tíðini 21.09.2018 til 02.04.2019. Styttsta ummælisfreistin var 9 dagar og longsta ummælisfreistin var 40 dagar. Í miðal var ummælisfreistin 20 dagar.

Fyri 6 uppskot var ummælistíðin 14 dagar ella minni svarandi til 50%. Fyri 6 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, av hesum var ummælistíðin fyri 5 av uppskotunum 28 dagar ella meiri.

4.2.2. Ummælisfreistir hjá Almannamálaráðnum

7 lógaruppskot vóru send til ummælis í tíðini 23.07.2018 til 20.12.2018. Styttsta ummælisfreistin var 19 dagar og longsta ummælisfreistin var 53 dagar. Í miðal var ummælisfreistin 43 dagar.

Onki uppskot hevði ummælistíð minni enn 14 dagar. Fyri øll 7 uppskotini var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, av hesum var ummælistíðin fyri 5 av uppskotunum 28 dagar ella meiri.

4.2.3. Ummælisfreistir hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum

12 uppskot vóru send til ummælis í tíðini 22.06.2018 til 03.07.2019. Styttsta ummælisfreistin var 7 dagar og longsta ummælisfreistin var 42 dagar. Í miðal var ummælisfreistin 19 dagar.

Fyri 7 uppskot var ummælistíðin minni enn 14 dagar svarandi til 58%. Fyri 5 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, av hesum var ummælistíðin fyri 4 av uppskotunum 28 dagar ella meiri.

Av teimum 12 uppskotunum vóru 9 *lógaruppskot*. Styttsta ummælisfreistin fyri hesi var 10 dagar og longsta ummælisfreistin var 42 dagar. Í miðal var ummælisfreistin fyri lógaruppskotini 21 dagar. Fyri 5 uppskot var ummælistíðin minni enn 14 dagar svarandi til 55%, og fyri hini 4 uppskotini var ummælisfreistin 28 dagar ella meiri svarandi til 45%.

Av teimum 12 uppskotunum vóru 3 *kunngerðaruppskot*. Styttsta ummælisfreistin var 7 dagar og longsta ummælisfreistin var 17 dagar. Í miðal var ummælisfreistin fyri kunngerðaruppskotini 12 dagar. Fyri 2 uppskot var ummælistíðin minni enn 14 dagar svarandi til 67%, og fyri 1 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar svarandi til 33%.

4.2.4. Ummælisfreistir hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

20 uppskot vóru send til ummælis í tíðini 20.07.2018 til 01.05.2019. Styttsta ummælisfreistin var 3 dagar og longsta ummælisfreistin var 53 dagar. Í miðal var ummælisfreistin 22 dagar. Fyri 8 uppskot var ummælistíðin 14 dagar ella minni svarandi til 40%, og fyri 12 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, av hesum var ummælistíðin fyri 6 av uppskotunum 28 dagar ella meiri.

Av teimum 20 uppskotunum vóru 8 *lógaruppskot* og 1 ríkislógartilmæli. Styttsta ummælisfreistin var 7 dagar og longsta ummælisfreistin var 53 dagar. Í miðal var ummælisfreistin fyri lógaruppskotini og ríkislógartilmæli 18 dagar. Fyri 5 uppskot var ummælistíðin 14 dagar ella minni svarandi til 55%, og fyri 4 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, av hesum var ummælistíðin fyri 1 uppskot 28 dagar ella meiri.

Av teimum 20 uppskotunum vóru 9 *kunngerðaruppskot*. Styttsta ummælisfreistin var 14 dagar og longsta ummælisfreistin var 41 dagar. Í miðal var ummælisfreistnin fyri kunngerðaruppskotini 29 dagar. Fyri 1 uppskot var ummælistíðin 14 dagar ella minni svarandi til 11%, og fyri 8 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, av hesum var ummælistíðin fyri 5 av uppskotunum 28 dagar ella meiri.

2 uppskot til samtyktar høvdu eina ummælisfreist uppá ávikavist 3 og 7 dagar.

4.2.6. Ummælisfreistir hjá Fiskimálaráðnum

16 uppskot vóru send til ummælis í tíðini 09.08.2018 til 12.04.2019. Styttsta ummælisfreistin var 5 dagar og longsta ummælisfreistin var 17 dagar. Í miðal var ummælisfreistin 8 dagar. Fyri 9 av

uppskotunum var ummælistíðin minni enn 14 dagar svarandi til 56%, og fyri 7 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, men einki uppskot hevði ummælistíð sum var 28 dagar ella meiri.

Av teimum 16 uppskotunum vóru 4 *lógaruppskot*. Stytsta ummælisfreistin var 7 dagar og longsta ummælisfreistin var 18 dagar. Í miðal var ummælisfreistin fyri lógaruppskotini 11 dagar. Fyri 3 lógaruppskot var ummælistíðin minni enn 14 dagar svarandi til 75%, og fyri 1 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, men minni enn 28 dagar.

Av teimum 16 uppskotunum vóru 12 *kunngerðaruppskot*. Styttsta ummælisfreistin var 5 dagar og longsta ummælisfreistin var 18 dagar. Í miðal var ummælisfreistin fyri kunngerðaruppskotini 12 dagar. Fyri 6 kunngerðaruppskot var ummælistíðin minni enn 14 dagar svarandi til 50%, og fyri 6 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, men minni enn 28 dagar.

4.2.7. Ummælisfreistir hjá Mentamálaráðnum

27 uppskot vóru send til ummælis í tíðini 17.09.2018 til 26.06.2019. Stytsta ummælisfreistin var 11 dagar og longsta ummælisfreistin var 45 dagar. Í miðal var ummælisfreistin 26 dagar. Fyri 3 uppskot var ummælistíðin 14 dagar ella minni svarandi til 11%, og fyri 24 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, av hesum var ummælistíðin fyri 8 uppskot 28 dagar ella meiri.

Av hesum 27 uppskotunum vóru 4 *lógaruppskot*. Stytsta ummælisfreistin var 15 dagar og longsta ummælisfreistin var 32 dagar. Í miðal var ummælisfreistin fyri lógaruppskotini 23 dagar. Fyri øll 4 uppskotini var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, av hesum var ummælistíðin fyri 1 uppskot 28 dagar ella meiri.

Av teimum 27 uppskotunum vóru 23 *kunngerðaruppskot*. Stytsta ummælisfreistin var 11 dagar og longsta ummælisfreistin var 45 dagar. Í miðal var ummælisfreistin fyri kunngerðaruppskotini 26 dagar. Fyri 3 uppskot var ummælistíðin 14 dagar ella minni svarandi til 13%, og fyri 20 uppskot var ummælisfreistin longri enn 14 dagar, av hesum var ummælistíðin fyri 7 av uppskotunum 28 dagar ella meiri.

4.2.8. Ummælisfreistir hjá Løgmansskrivstovuni

8 uppskot vóru send til ummælis í tíðini 27.09.2018 til 15.04.2019. Stytsta ummælisfreistin var 6 dagar og longsta ummælisfreistin var 42 dagar. Í miðal var ummælisfreistin 30 dagar. Fyri 1 uppskot var ummælistíðin 14 dagar ella minni svarandi til 12%, og fyri 7 uppskot var ummælisfreistin 28 dagar ella meiri.

Av hesum 8 uppskotunum vóru 3 *lógaruppskot* og 3 ríkislógartilmæli. Stytsta ummælisfreistin var 6 dagar og longsta ummælisfreistin var 42 dagar. Í miðal var ummælisfreistin fyri lógaruppskotini og ríkislógartilmælini 30 dagar. Fyri 1 uppskot var ummælistíðin 14 dagar ella minni svarandi til 17%, og fyri 5 uppskot var ummælisfreistin 28 dagar ella meiri.

Av teimum 8 uppskotunum vóru 2 *kunngerðaruppskot*. Styttsta ummælisfreistin var 28 dagar og longsta ummælisfreistin var 35 dagar. Í miðal var ummælisfreistin fyri kunngerðaruppskotini 32 dagar. Fyri 3 uppskot var ummælistíðin 14 dagar ella minni svarandi til 13%, og fyri bæði uppskotini var ummælisfreistin longri enn 14 dagar svarandi til 100%.

Mynd 8



4.3. Samanumtøka um ummælisfreistir

Sum tað sæst á myndini omanfyri hava øll stjórnarráðini uttan Almannamálaráðið sent uppskot til ummælis við styttri freist enn 14 dagar. Tilsamans vóru 33% av uppskotunum hjá øllum stjórnarráðunum undir einum send til ummælis við styttri enn 14 daga freist, og sum nevnt frammanfyri er *ein ummælisfreist, sum er minni enn 14 dagar, ikki nøktandi*.

Fyri Heilsu- og innlendismálaráðnum var talan um 58% av teirra uppskotum, fyri Fiskimálaráðið var talan um 56% av teirra uppskotum, fyri Fíggjarmálaráðnum 50 %, Uttanríkis og vinnumálaráðnum 40%, meðan talan var um 12% av uppskotunum hjá Løgmansskrivstovuni, og síðani 11% av uppskotunum Mentamálaráðnum.

Tað er hinvegin jaligt, at 67% ella 2/3 av uppskotunum hóast alt hava verið send til ummælis við meira enn 15 daga freist, sum má metast at vera eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist.

Tá talan er um at senda uppskot til ummælis við *tilmæltu ummælisfreistini uppá 4 vikur*, var fyri Løgmansskrivstovuna talan um 87,5% av teirra uppskotum, fyri Almannamálaráðið 71,4%, Fíggjarmálaráðið 42,6%, Heilsu- og innlendismálaráðið 33,3%, Uttanríkis og vinnumálaráðið 30% og síðani 29,6% av uppskotunum hjá Mentamálaráðnum, meðan Fiskimálaráðið skilur seg út við, at onki av teirra uppskotum hava havt minst 4 vikurs ummælisfreist. Fyri

Mynd 9



4.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin

Á ummælisportalinum sæst, at í tingárinum 2018 løgdu stjórnarráðini tilsamans 102 uppskot alment til ummælis á ummælisportalinum. Av hesum vóru 47 løgtingslógaruppskot, 49 kunngerðir, 4 ríkislógartilmæli og 2 uppskot til samtyktar.

Talva 13	**Uppskot løgd á ummælisportalin og eftirkannað uppskot**		
	Uppskot løgd á ummælisportalin	**Uppskot sum eru eftirkannað**	**Ikki løgd á ummælisportalin**
Løgtingslógir	47	101	54 (53%)
Kunngerðir	49	147	98 (67%)
Ríkislógartilmæli	4	6	2 (33%)
Uppskot til samtyktar	2	2	0 (100%)
Tilsamans	**102**	**254**	**152 (60%)**

Í mun til hetta so eftirkannaði lógartænastan 254 uppskot, ið øll áttu at verið løgd út til almenna hoyring á ummælisportalinum. Av hesum vóru 101 løgtingslógaruppskot, 147 kunngerðir, 6 ríkislógartilmæli og 2 uppskot til samtyktar.

Tað ber ikki til beinleiðis at samanlíkna hesi tølini, tí uppskot kunnu verða send til ummælis í eini tingsetu, men tey verða ikki eftirkannað og løgd fyri Løgtingið fyrrenn í næstu tingsetu.

Hóast hesa óvissu tykist tað at vera ein rættuliga stórur munur á eftirkannaðum uppskotum og uppskotum løgd á ummælisportalin, tá munurin er uppá 152 uppskot. Hetta merkir at 60% av uppskotunum ikki vóru løgd á ummælisportalin.

Vit fara at heita á stjórnarráðini um at minnast til, at øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini skulu leggjast á ummælisportalin, umframt at stjórnarráðini senda uppskot beinleiðis til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum.

4.4.1. Fíggjarmálaráðið

Talva 14 **FMR**	**Uppskot løgd á ummælisportalin**	**Uppskot, sum eru eftirkannað**	**Ikki løgd á ummælisportalin**
Løgtingslógir	12	25	13 (52%)
Kunngerðir	-	2	2 (100%)
Ríkislógartilmæli	-	3	3 (100%)
Tilsamans	**12**	**30**	**18 (60%)**

Lógartænastan eftirkannaði 30 uppskot hjá Fíggjarmálaráðnum, men bara 12 uppskot vóru løgd á ummælisportalin. Hetta er 40% av eftirkannaðu uppskotunum, tvs. at 60% vóru ikki løgd á ummælisportalin. Hóast tað vóru eftirkannað 25 lógaruppskot, vóru einans 12 uppskot løgd á ummælisportalin. Heldur ikki 3 ríkislógartilmæli vóru løgd á ummælisportalin.

4.4.2. Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Talva 15 **UVMR**	**Uppskot løgd á ummælisportalin**	**Uppskot, sum eru eftirkannað**	**Ikki løgd á ummælisportalin**
Løgtingslógir	8	10	2 (10%)
Kunngerðir	9	18	9 (50%)
Ríkislógartilmæli	1	1	0 (100%)
Uppskot til samtyktar	2	2	0 (100%)
Tilsamans	**20**	**29**	**9 (31%)**

Lógartænastan eftirkannaði 29 uppskot hjá Uttanríkis og vinnumálaráðnum, og 20 uppskot vóru løgd á ummælisportalin. Hetta er 69% av eftirkannaðu uppskotunum, tvs. at 31% vóru ikki løgd á ummælisportalin. Hóast tað vóru eftirkannað 18 kunngerðaruppskot, vóru einans 9 uppskot løgd á ummælisportalin. Av 10 eftirkannaðum lógaruppskotum vóru 2 ikki løgd á ummælisportalin.

4.4.3. Fiskimálaráðið

Talva 16 **FISK**	**Uppskot løgd á ummælisportalin**	**Uppskot, sum eru eftirkannað**	**Ikki løgd á ummælisportalin**
Løgtingslógir	4	7	3 (43%)
Kunngerðir	12	55	43 (61%)
Tilsamans	**16**	**62**	**46 (74%)**

Lógartænastan eftirkannaði 62 uppskot hjá Fiskimálaráðnum, og 16 uppskot vóru løgd á ummælisportalin. Hetta er 26% av eftirkannaðu uppskotunum, tvs. at 74% vóru ikki løgd á ummælisportalin. Hóast tað vóru eftirkannað 55 kunngerðaruppskot, vóru einans 12 uppskot løgd á ummælisportalin. Av 7 eftirkannaðum lógaruppskotum vóru 4 ikki løgd á ummælisportalin.

4.4.4. Mentamálaráðið

Talva 17 **MMR**	**Uppskot løgd á ummælisportalin**	**Uppskot, sum eru eftirkannað**	**Ikki løgd á ummælisportalin**
Løgtingslógir	4	9	5 (56%)
Kunngerðir	23	32	9 (28%)
Tilsamans	**27**	**41**	**14 (34%)**

Lógartænastan eftirkannaði 41 uppskot hjá Mentamálaráðnum, og 27 uppskot vóru løgd á ummælisportalin. Hetta er 66% av eftirkannaðu uppskotunum, tvs. at 34% vóru ikki løgd á ummælisportalin. Tað vóru eftirkannað 32 kunngerðaruppskot, og einans 23 uppskot vóru løgd á ummælisportalin. Av 9 eftirkannaðum lógaruppskotum vóru 5 ikki løgd á ummælisportalin.

4.4.5. Almannamálaráðið

Talva 18 **AMR**	**Uppskot løgd á ummælisportalin**	**Uppskot, sum eru eftirkannað**	**Ikki løgd á ummælisportalin**
Løgtingslógir	7	20	13 (65%)
Kunngerðir	0	9	9 (100%)
Tilsamans	**7**	**29**	**22 (76%)**

Lógartænastan eftirkannaði 29 uppskot hjá Almannamálaráðnum, og 7 uppskot vóru løgd á ummælisportalin. Hetta er 24% av eftirkannaðu uppskotunum, tvs. at 76% vóru ikki løgd á ummælisportalin. Onki av teimum 9 eftirkannaðu kunngerðaruppskotunum vóru løgd á ummælisportalin. Av 20 eftirkannaðum lógaruppskotum vóru 13 ikki løgd á ummælisportalin.

4.4.6. Heilsu- og innlendismálaráðið

Talva 18 **HIMR**	**Uppskot løgd á ummælisportalin**	**Uppskot, sum eru eftirkannað**	**Ikki løgd á ummælisportalin**
Løgtingslógir	9	12	3 (25%)
Kunngerðir	3	21	18 (86%)
Ríkislógartilmæli	0	1	1 (100%)
Tilsamans	**12**	**34**	**22 (65%)**

Lógartænastan eftirkannaði 34 uppskot hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum, og 12 uppskot vóru løgd á ummælisportalin. Hetta er 35% av eftirkannaðu uppskotunum, tvs. at 65% vóru ikki løgd á ummælisportalin. Tað vóru eftirkannað 21 kunngerðaruppskot, og einans 3 uppskot vóru løgd á ummælisportalin. Av 12 eftirkannaðum lógaruppskotum vóru 3 ikki løgd á ummælisportalin.

4.4.7. Samferðslumálaráðið

Talva 19 **SMR**	**Uppskot løgd á ummælisportalin**	**Uppskot, sum eru eftirkannað**	**Ikki løgd á ummælisportalin**
Løgtingslógir	0	11	11 (100%)
Kunngerðir	0	8	8 (100%)
Tilsamans	**0**	**19**	**19 (100%)**

Lógartænastan eftirkannaði 19 uppskot hjá Mentamálaráðnum, og onki av hesum uppskotunum vóru løgd á ummælisportalin. Tað kundi bent á at Samferðslumálaráðið ikki er vitandi um, at

umframt at senda uppskot til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, skulu uppskot eisini leggjast á ummælisportalin.

4.4.8. Løgmansskrivstovan

Talva 20 **LMS**	**Uppskot løgd á ummælisportalin**	**Uppskot, sum eru eftirkannað**	**Ikki løgd á ummælisportalin**
Løgtingslógir	3	5	2
Kunngerðir	2	2	0
Ríkislógartilmæli	3* (1)	1	0
Tilsamans	**8 (6)**	**8**	**2**

*2 av hesum ríkislógartilmælum vórðu eftirkannað í tingárinum 2019

Lógartænastan eftirkannaði 8 uppskot hjá Løgmansskrivstovuni, og 6 uppskot vóru løgd á ummælisportalin. Hetta er 75% av eftirkannaðu uppskotunum, tvs. at 25% vóru ikki løgd á ummælisportalin. Av 5 eftirkannaðum lógaruppskotum vóru 2 ikki løgd á ummælisportalin.

4.5. Samanumtøka um ummælisportalin

Sum tað sæst verða millum 25% og 100% av uppskotunum hjá stjórnarráðunum ikki løgd á ummælisportalin. Frægast er Løgmansskrivstovan, har einans 25% av uppskotunum ikki eru á ummælisportalinum. Síðani kemur Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, har 31% av uppskotunum ikki eru á ummælisportalinum og Mentamálaráðnum við 34% av teirra uppskotum. Hinvegin eru 46% av uppskotunum hjá Fiskimálaráðnum, 60% av uppskotunum hjá Fíggjarmálaráðnum, 76% hjá Almannamálaráðnum og síðani 100% av uppskotunum hjá Samferðaslumálaráðnum ikki løgd á ummælisportalin. Tað er als ikki nøktandi, at so stórur partur av uppskotunum ikki verða løgd út til almenna hoyring á ummælisportalinum.

Vit halda at hesi tølini vísa, at stjórnarráðini ikki í nóg stóran mun er greið yvir, at øll uppskot skulu eisini leggjast á ummælisportalin, *umframt* at tey verða send beinleiðis til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum.

5. Kunngerðarblaðið

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðablað, sum broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 14. desember 2012, verður álagt landsstýrinum at stíla fyri útgávu av einum almennum kunngerðablaði: Kunngerðablaðið.

Í Kunngerðablaðnum skulu allar løgtingslógir, kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, ið landsstýrið gevur út, kunngerast.

Frá 1. januar 2013 verður Kunngerðablaðið einans givið út talgilt og ikki í pappírsútgávu sum áður. Kunngerðaportalurin gerst við hesum einasti bindandi kunngerðamiðilin til løgtingslógir, kunngerðir o.a.

Í Kunngerðablaðið A verða løgtingslógir og kunngerðir, givnar av landsstýrinum, kunngjørdar, og í Kunngerðablaðið B verða lógir og kunngerðir, ið ríkismyndugleikarnir geva út, kunngjørdar.

Tað er lógartænastan, sum hevur ábyrgd fyri at geva út Kunngerðarblaðið. Kunngerðablaðið verður vanliga givið út fríggjadagar.

5.1. Kunngering í tingárinum 2018

Í tingárinum 2018 vóru tilsamans 228 løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógir og bekendtgørelser kunngjørd í Kunngerðarblaðnum. Av hesum vóru 205 føroyskar rættarreglur og 23 ríkislóggáva. Tvs. at 90% av kunngjørdu rættarreglunum eru føroyskar, meðan 10% er donsk ríkislóggáva.

Talva 21	**Kunngerðir**	**Løgtings-lógir**	**Fyriskipan (Anordning)**	**Bekendt-gørelse**	**Fíggjar-lóg o.a.**	**Fráboðan løgmans**
Almannamálaráðið	8	8	-	-	-	-
Fiskimálaráðið	53	6	-	-	-	-
Fíggjarmálaráðið	4	18	2	1	9	-
Heilsu- og innlendismálaráðið	8	2	1	10	-	-
Løgmansskrivstovan	1	3	-	3	-	7
Mentamálaráðið	32	4	-	1	-	-
Samferðslumálaráðið	8	5	-	-	-	-
Uttanríkis- og vinnumálaráðið	19	10	-	5	-	-
Ialt	**133**	**56**	**3**	**20**	**9**	**7**

Mynd 10



5.2. Kunngjørdar rættarreglur hjá stjórnarráðunum

5.2.1. Fiskimálaráðið

Fiskimálarráðið kunngjørdi 59 rættarreglur: 53 kunngerðir og 6 løgtingslógir. Nærum allar kunngerðirnar eru um at skipa fiskiskapin, og av teimum 6 lógunum viðvíkja 5 fiskivinnuni. Ein lógarbroyting var um landbúnaðin; talan var um eitt anstøðuuppskot, sum varð samtykt í tinginum.

5.2.2. Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunngjørdi 34 rættarreglur: 19 kunngerðir, 10 løgtingslógir og 5 bekendtgørelser.

Kunngerðirnar eru innan aling, ferðavinnu, trygd á sjónum, partafeløg, grannskoðan og skráseting. Ein kunngerð er frá Sjóvinnustýrinum.

Løgtingslógirnar eru um loyvisgjald á alivinnuna, einskilja P/F Postverk Føroya, Matstovulóg, tónleikaútflutningsstovu, innflutning og sølu av rúsdrekka, broyting í Vinnufyritøkulógini, fimta útboðingarumfar viðvíkjandi kolvetni, broyting í lógini um trygd á sjónum og loðslógini.

Bekendtgørelserne eru um patent, design, gjøld sambært luftfartsloven og javning av upphæddum sambært Útlendingalógini.

5.2.3. Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið kunngjørdi 34 rættarreglur: 4 kunngerðir, 18 løgtingslógir, 2 fyriskipanir, 1 bekendtgørelser og 9 fíggjarlóg, eykajáttanarlógir og eykafíggjarlógir.

Kunngerðirnar eru um røkt av fæi hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, útgjald av burturbeiningargjaldi og eyðmerking og fráboðan av fíggjarkontum við tilknýti til útheimin.

Løgtingslógirnar eru um stuðul til dupult húsarhald, avgjøld av skráseting av motorakførum, veg- og umhvørvisgjald av motorakførum, áseting av skatti, meirvirðisgjald, skattafría samanlegging, eftirløn, Toll- og skattafyrisiting, skatting av kapitalvinningi, tvískattasáttmáli millum norðurlond, varskógvaraskipan fyri alment sett starvsfólk, arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, Virkisskrá og talgildan samleika.

Fyriskipanarnar og bekendtgørelserne eru øll um lóggávuna á peningastovnsøkinum.

Fíggjarlógirnar eru ein fíggjarlóg 2019, ein eykafíggjarlóg 2018 og 7 eykajáttanarlógir, 3 fyri 2018 og 4 fyri 2019.

5.2.4. Heilsu- og innlendismálaráðið

Heilsu- og innlendismálaráðið kunngjørdi 21 rættarreglur: 8 kunngerðir, 2 løgtingslógir, 1 fyriskipanir og 10 bekendtgørelser.

Kunngerðirnar eru um verjumál, ókeypis koppseting, fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, valstøð, prístalsviðgerð av tilskoti til tilskotsheimilaðan heilivág og um sterkstreymsreglugerð.

Løgtingslógirnar eru um elveitingarlóg og um virksemi á stovnum, sum veita rúsviðgerð.

Fyriskipanin er um "stedbestemt information" og bekendtgørelserne eru innan heilsulóggávuna og um heilsustarvsfólk.

5.2.5. Mentamálaráðið

Mentamálaráðið kunngjørdi 37 rættarreglur: 32 kunngerðir, 4 løgtingslógir og 1 bekendtgørelse.

Kunngerðirnar eru um skúlaverkið, musikkskúlaskipanina, lestrarstuðul, handfara bjargingarbátar o.a., brandleiðslu, førleikastovur, heilsuhjálparaútbugving o.a. og orgulleikaraútbúgving.

Løgtingslógirnar eru um húsarhaldsskúla í Klakvík, skúladepil í Tórshavn, fólkaskúlan og heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og námsfrøðiliga hjálparaútbúgving.

Bekendtgørelsen var ein millumtjóða sáttmáli um vernd av immateriella mentanararvinum.

5.2.6. Løgmansskrivstovan
Løgmansskrivstovan kunngjørdi 14 rættarreglur: 1 kunngerð, 3 løgtingslóg, 7 fráboðanir og 3 bekendtgørelser.

Løgtingslógirnar vóru um broyting í revsilógini, broyting í Tilhaldslógini og yvirtøka av málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki. Kunngerðin var um flutning av persónsupplýsingum til útlond.

Bekendtgørelserne vóru um advokatskyldur, fría rættarførslu og viðurlag til stevningsmenn og vitni í fútamálum.

Fráboðanirnar vóru dagføringar av býtinum av málsøkjum millum landsstýrismenninar.

5.2.7. Almannamálaráðið
Almannamálaráðið kunngjørdi 16 rættarreglur: 8 kunngerðir og 8 løgtingslógir.

Kunngerðirnar eru um almannaveitingar, samsýning til fosturforeldur, umsiting av samsýning fyri eldri og óhjálpnum persónum, virkisvenjing, arbeiðsbúgving, tillagað starv, leiðbeinaraskipan, umsiting av ogn hjá ómyndugum og persónum undir verju, viðbót sambært almannapensjónslógini og um bráðfengis bústaðartørv.

Løgtingslógirnar eru um arbeiðsfremjandi tiltøk, dagpening vegna sjúku, broyting í forsorgarlógini, familjuískoyti, viðbót til ávísar pensjónistar, heimatænastu og eldrarøkt, leigulóg.

5.2.8. Samferðslumálaráðið
Samferðslumálaráðið kunngjørdi 13 rættarreglur: 8 kunngerðir og 5 løgtingslógir.

Kunngerðirnar eru um innrætting og nýtslu av trýstberandi útbúnaði, uppseting og nýtslu av lyftum, løggildum av serkønum veitarum, koyrikort og koyrifrálæru, hýruvognsreglugerð fyri Klaksvíkar kommunuog flutning av vandamiklum farmi.

Løgtingslógirnar eru um ferðslulógina, fólka- og farmaflutning og Barsilslógina.

Mynd 11



6. Samlað yvirlit hjá samgonguni 2015-2019

Ársfrágreiðingin um eftirkanning frá lógartænastan kom fyrstu ferð kom út fyri tingárið 2014.

Samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn, sum sat í landsstýrinum frá 14. september 2015 til 13. september 2019, er tí tað fyrsta landsstýrið, har ársfrágreiðingin er givin út alt teirra virkisskeið.

Í hesum partinum vísa vit nøkur tøl um teirra avrik lóggávuliga.

6.1. Eftirkanningar 2015-2018

Talva 22

	Eftirkanningar 2015-2018				
	2015	**2016**	**2017**	**2018**	**Tilsamans**
Løgtingslóg	**11**	**14**	**23**	**29**	**77**
Kunngerð	**74**	**97**	**88**	**93**	**352**
Broytingarlóg	**64**	**50**	**46**	**72**	**232**
Broytingarkunngerð	**36**	**50**	**65**	**54**	**160**
Ríkislógartilmæli	**3**	**11**	**12**	**6**	**32**
Uppskot til samtyktar	**1**	**-**	**1**	**2**	**4**
Fráboðan frá løgmanni	**2**	**-**	**-**	**1**	**3**
Stovnar			**5**	**1**	**6**
Rundskriv			**6**	**8**	**14**
Leiðbeining			**2**	**-**	**2**
Ialt	**191**	**222**	**248**	**266**	**927**

Tað sæst at eftirkanningarnar sum væntað eru fægstar tað fyrsta tingárið 2015, tá eftirkannaði vóru 191 uppskot. Síðani hækkar talið av uppskotum líðandi til 222 í tingárinum 2016, til 248 í tingárinum 2017 og síðani til 266 eftirkannað uppskot seinasta tingárið í valskeiðnum, tvs. tingárið 2018. Tilsamans vóru í hesum landsstýrisskeiðnum eftirkannaði 927 uppskot o.a.

6.2. Kunngjørdar rættarreglur 2015-2018

Kunngjørdar rættarreglur eru løgtingslógir, sum Løgtingið hevur samtykt, kunngerðir, sum landsstýrismenn hava givið út, meðan ríkislóggáva er donsk lóg, konglig fyriskipan og donsk bekendtgørelser.

Talva 23	Kunngjørdar rættarreglur 2015-2018				
	2015	**2016**	**2017**	**2018**	**Tilsamans**
Løgtingslógir	53	71	66	65	255
Kunngerðir	103	116	127	133	479
Ríkislóggáva	16	36	45	23	120
Ialt	**172**	**223**	**238**	**221**	**854**

Tað sæst, at í tingárunum 2015-2019 vórðu tilsamans 854 rættarreglur kunngjørdar í Kunngerðablaðnum. Av hesum eru 255 løgtingslógir, 479 kunngerðir og 120 ríkislógir og bekendtgørelse.

Býti av teimum 854 rættarreglunum er javnt býtt yvir øll 4 árini, tó so at í fyrsta tingárinum í 2015 vóru eitt sindur færri rættarreglur kunngjørdar enn tey seinnu árini. Talið av løgtingslógum, kunngerðum og ríkislóggávu er støðugt øll 4 árini.

Av teimum 854 rættarreglunum vóru 735 føroyskar rættarreglur og 120 danskar rættarreglur. Tað merkir, at 86% av kunngjørdu rættarreglunum eru á føroyskum og 14% eru á donskum.